## Sangtiltak og Ungdómsguðstænasta í Leirvík

Komandi fríggjakvøld 21. november klokkan 21 verður eitt spennandi lovsangstiltak í missiónshúsinum í Leirvík. Á skránni verður millum annað nógvur sangur, tónleikabólkurin TOS kemur at framføra og Marius Jacobsen hevur eina andakt. Eftir lovsangsløtuna verður drekkamunnur. Síðani verður eftirmøti við millum annað sangi, sangframførslu og fríari vitniløtu. Sunnukvøldið 23. november klokkan 20 verður Ungdómsguðstænasta í Leirvíkar Kirkju við Hanus Simonsen, presti. Á skránni verður millum annað tala, felagssangur, sangframførsla við Elly Justinussen, tvørfloytuspæl og altargongd.




## Trillan nýggjar eigarar

Undirklædnahandilin Trillan hevur nú fingið nýggjar eigarar. Av tí sama er hon nú eisini flutt, og handilin nú at finna í Saltangará, í sama bygningi sum TrendFloor, Fonnflog og City. Undirklædnahandilin hevur verið á Tvøroyri seinastu 4 árini og kemur upprunaliga úr Klaksvík. Trillan hevur eitt stórt úrvæl av undirklæðum til kvinnur í øllum aldri og umboða kvalitetsmerkir sum Barbara, Ballet, Masquerade, Freya og so framvegis. Eisini selur Trillan nakað av undirklæðum til menn.

# Ósemja um borgarstjórar

**Heðin Mortensen og Bogi Andreasen eru ósamdir um, hvussu langt ætlanin viðvíkjandi fleiri borgarstjórum er komin**

SAMGONGA
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Nógv tos hevur verið um ætlanirnar hjá Tórshavnar kommunu, um at hava fleiri andlit á kommununi heldur enn bara borgarstjóran, sum hinir kommunustýrislimir hava verið ónøgdir við. Ein av hesum ætlanum er at seta tveir limir úr kommununi afturat borgarstjóranum. Komandi hægstu menninir í Tórshavnar kommunu er tó ósamdir, um hvørji hesi fólkini skulu verða.

- Tað er púra greitt, at borgarstjórin verður ein. Eisini meti eg, at Bogi Andreasen verður við, tí hann er jú varaborgarstjóri, sigur Heðin Mortensen, hóast hann á ongan hátt vil siga nakað um triðja personin.

- Eg veit ikki um tað verður ein úr tjóðveldinum ella ein úr javnaðarflokkunum. Eg veit heldur ikki um tað verður ein maður ella ein kvinna. Tað eru alt ting vit fara at hyggja uppá, men tað er greitt, at hetta fer at gera tað soleiðis, at vit í framtíðini fara at hava eitt effektivari politiskt arbeiði í Tórshavnar kommunu. So sjálvandi skulu kommunustýrislimir hava meiri løn, greiðir Heðin Mortensen frá.

Hesum er komandi varaborgarstjórin ósamdur við, tí hann er vísur í, at tað verða í hvussu so er tvey úr tjóðveldinum, ið koma at vera saman við borgarstjóranum.

- Tað er greitt, at tað verða tveir limir úr tjóðveldinum. Eg veit ikki, hvørji av okkum tað vera, og heldur ikki um eg sjálvur verði ein. Men tað verða heilt víst tveir limir úr Tjóðveldi, sigur Bogi Andreasen.

Tískil kunnu vit enn bíða í spenningi eftir hesari ætlanini hjá Tórshavnar kommunu, um at býta uppmerksemi til ymisku kommunustýrislimirnar í Tórshavnar kommunu.



*Tjóðveldi krevur bæði andlitini, ið skulu standa borgarstjóranum næst komandi fýra árini*

# Býráðið heldur fram

**Tá nýggja samgongan í Tórshavnar kommunu tekur við 1. januar 2009 verður ikki nógv broytt í mun til arbeiðið, ið er gjørt. Tó skal kommunan gera nýggjan musikkskúla og skúla á Argjum. Samstundis skulu tey føra ein varnan fíggjarpolitikk**

SAMGONGA
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Hóast fíggjarkreppa er kring allan heim, ætlar Tórshavnar kommuna ikki at steðga ætlanunum hjá í liggja fyri framman*

Byggingin av fimleikarhøllini í Gundadali skal halda fram, skúli skal byggjast á Argjum, musikkskúli skal byggjast og grundstykki skulu útvegast. Hetta síggja út til at vera høvuðsprioriteringarnar hjá Tórshavnar kommunu næstu fýra árini.

Undir heitinum »Vit halda kósina« er arbeiðsskjalið hjá komandi samgonguni í Tórshavnar kommunu latið fjølmiðlunum.

Ovast greiða tey frá at tað skal vera gott at búgva í kommununi og at fíggjarligt skynsemi skal havast næsta valskeiðið. Hinvegin standa nógvar stórætlanir í skjalinum. Skúlar, fimleikarhøll og so framvegis.

- Vit mugu ansað eftir, at vit ikki byrja eina kreppu. Vit kunnu lána upp til 600 milliónir krónur, um tað gerst neyðugt, tí vit mugu fyri alt í verðini syrgja fyri, at fólkið í býnum hevur arbeiði. Sjálvandi verða vit noydd at prioritera, men kommunan er rímiliga væl fyri, og eg beri ongan ótta fyri, at vit ikki skulu klára at føra okkara ætlanir út í lívið, sigur Heðin Mortensen.

### Útjaðarin

Á tíðindafundinum í morgun, kom eisini fram, at tað fyri nógvar limir í býráðnum, er sera týdningarmikið, at tað ikki bert verður miðbýurin, tað skal gerast nakað við.

- Vit mugu fáa skil uppá ætlanirnar við jørð. Vit mugu syrgja fyri at fáa eina greiða ætlan viðvíkjandi Glyvursnesi, tí økið er sera væl egnað til nógv ting, og vit mugu syrgja fyri at fáa greið boð frá landinum viðvíkjandi flogvøllinum. Vit mugu eisini fáa fleiri grundøkir í Kollafirði, soleiðis, at grundstykki gerast tøk, greiðir Jógvan Arge frá.

Eisini bussleiðina skal kommunan ger nakað við.

- Vit fara at arbeiða fyri at endurnýggja bussleiðina, soleiðis at Kollafjørður fær betri samband, samstundis sum Kirkjubøur og Velbastað verða integreraði í vanligu bussleiðina, greiða fleiri í samgonguni frá.

### Ungdómspolitikkur

Ætlanin hjá komandi býráðnum er eisini at hava ein samskipaðan ungdómspolitikk, soleiðis at Hoyvíkin, Kollafjørður og Eysturbýurin fáa betri møguleikar í frítíðini. Í hesum sambandi eru ætlanir um at nýta hús, ið longu eru til ungdómarnar.

- Skúlan í Hoyvík skal nýtast til frítíðarvirksemi eisini. Vit kunnu nýta loftið í høllini í Kollafirði, soleiðis, at tey ungu har, eisini fáa ein ágóða, greiða fleiri av býráðslimunum frá. Tey leggja afturat, at ungdómarnir í býnum skulu hava betri møguleikar í sínum økjum, soleiðis, at ikki alt virksemi liggur í miðbýnum.

### Menna miðbýin

Komandi samgongan hevur eisini í hyggju, at betra um miðbýin, soleiðis at øll fáa betri ágóða av honum.

Miðbýurin skal aftur gerast ein livandi býarpartur, so fólk og familjur hava nakað at leita hagar til til gamans